## Sølan av bilum hálverað

Seinasta hálva árið er sølan av nýggjum bilum í Russlandi næstan hálverað. Øll bilmerkini hava havt afturgongd uttan Volkswagen. Størsta marknaðarpart hava russisku Lada við umleið 25 prosentum Russland hevur annars verið skjótast vaksandi marknaður í Evropa seinastu árini.



## Fleiri nýggir bilar

Fyri fyrstu ferð í 13 mánaðir er sølan av nýggjum bilum í Japan vaksandi. Sølan í august vaks við 2,3 prosentum í mun til í fjør. Tey flestu japansku bilmerkini høvdu framgongd, meðan nøkur høvdu afturgongd. Hybridbilarnir hjá Toyota og Honda høvdu størst framgongd. Helst orsakað av lágu avgjøldini upp á hesar bilar.

# Gátan um tosk

**Føroyski fiskifrøðingurin Petur Steingrund fer í Bergen í morgin at verja doktararitgerð sína um føroyska toskin. Hervið eru fleiri av gátunum um toskin á føroyska landgrunninum loystar**



*Petur Steingrund*





GÁTAN UM TOSKIN
*Dánjal Petur Højgaard*

### Føroysk fiskifrøði á odda um toskin á norðurhálvu jarðar

Í mongum londum hava sveiggini í toskastovnum volt bæði fiskimonnum og fiskifrøðingum stórt høvuðbrýggj. Hví øll hesi sveiggj? Hví og hvar ferðast toskurin? Hvat er tað, ið stýrir flytingini av teim ymsu aldursbólkunum hjá einum toskastovni?

Hesir spurningar fáa svar fríggjadagin, við tað, at doktararritgerðin "*Food availability and feeding in Atlantic cod (Gadus morhua L.) at Faroe Islands: consequences for spatial distribution, recruitment, natural production and fishery*" í morgin verður vard væl og virðiliga við Universitet i Bergen.

### Verjan vardi

Miðvísa, vísindaliga arbeiðið á Havstovuni (fyrr: Fiskirarnnsóknarstovuni) hevur enn einaferð borið stoltan ávøkstur.!

Arbeiðið hjá Peturi hevur víst seg at vera slóðbrótandi á mongum økjum. Umframt sínar egnu merkingarroyndir, magakanningar o.a.m., setir hann hesi eisini í samband við onnur granskingarúrslit á stovninum. Til dømis kanningar av gróðrinum. Ein kann tí av sonnum tosa um eina synergieffekt í arbeiðinum hjá Havstovuni: summurin av øllum, ið verður lagt saman, gerst munandi størri enn væntað! Arbeiðið hjá Peturi gongur fyri seg á mongum, ymiskum fakligum stigum. Kanningar og kjak er farið fram innan: vistfrøði, fiskifrøði, atburðarfrøði, arvafrøði og lívevnafrøði. Hetta gevur ritgerðini eina heilt óvanliga fakliga styrki – og harvið góða vissu fyri, at niðurstøðurnar eru rættar.

Í stuttum kann nevnast, at Petur Steingrund hevur funnið fram til ein kollveltandi samanhang millum vøkstur hjá toskastovninum og stovnsstøddina. Hetta er ein útrokningarháttur, ið eisini kann vera til at greina, hvat hendir við toskinum í øðrum havøkjum.

Sum dømi um eitt annað óvæntað og spennandi úrslit, kann nevnast sambandið millum 1-2 ára gamlar toskar og slánar (gamlar rak-toskar). Her hevur Petur funnið vísindaliga haldgott prógv fyri, at slánarnir (ið eru innarlaga, tá ið lítil føði er til) eru við til at beina teir yngru út á djúpari vatn, har teir kunnu vaksa seg stórar og feitar av tí føðini, ið er har úti.

Mangt annað kann nevnast úr drúgvu doktara-ritgerðini hjá Peturi, ið fevnir um ikki minni enn 10 vísindaligar greinar. Til dømis, um hvat í veruleikanum hendi, tá ið toskurin »hvarv« í nítiárunum, undir kreppuni.

Roknast kann við, at hetta koma føroyingar at hoyra nærri um í komandi døgum, tá ið Petur og kona hansara, Tórun, koma heim aftur á klettarnar!

*Perman á ritgerðini sær soleiðis út:*
***Food availability and feeding in Atlantic cod (Gadus morhua L.) at Faroe Islands: consequences for spatial distribution, recruitment, natural production and fishery***

## FAKTA

Fyrrverandi føroyska Fiskirannsóknarstovan (nú Havstovan) hevur enn einaferð í verki víst, at fakliga arbeiði hennara hevur internationalt støði. Niðanfyri er víst, hvørjir persónar, atknýttir í størri ella minni mun til Havstovuna hava vart PhD/doktararitgerðir. Eisini eru evni og heiti sett upp:

**2009:** Petur Steingrund (um føroyska toskastovnin á landgrunninum, serliga føði og ferðing): Food availability and feeding in Atlantic cod (*Gadus morhua* L.) at Faroe Islands: consequences for spatial distribution, recruitment, natural production and fishery

**2009:** Karin Margretha H. Larsen (um vatnskifti á føroyska landgrunninum og á árin á vistskipan): Circulation and exchange of water masses on the Faroe Shelf and the impact on the Shelf ecosystem

**2007:** Høgni H. Debes (um sambandið millum plantu- og djóraæti á føroyska landgrunninum): Phytoplankton and Zooplankton Interactions on the Faroe Shelf

**2004:** Hjálmar Hátún (um streymvíðurskifti við Føroyar): The Faroe Current

**2002:** Hóraldur Joensen (um fitisýrur í føroyskum fiski): Discrimination among fish species and stocks by multivariate analysis of fatty acid profiles in selected tissues

**2001:** Eilif Gaard (um æti-samfelagið á føroyska landgrunninum): The Plankton Community Structure on the Faroe Shelf

**2000:** Jan Arge Jacobsen (um laksin og vistfrøði hansara): Aspects of the marine ecology of Atlantic salmon (*Salmo salar* L.)

**1998:** Dánjal Petur Højgaard (um upsa og lívsringrásina hjá rundormum): Aspects of the Life Cycle of Whaleworm, *Anisakis simplex*, and its Infection of Saithe, *Pollachius*